


# Dátueftirlitið

## Ársfrágreiðing 2020

# INNIHALD


1. **Fororð** 3

2. **Dátueftirlitið, Ráðið og skrivstovan** 4
   2.1 Játtanin á løgtingsfíggjarlógini 5
   2.2 Lógargrundarlagið hjá Dátueftirlitinum 5
      2.2.1. Nýggj dátuverndarlóg 5
   2.3 Uppgávan hjá Dátueftirlitinum 5

3. **Virksemi í árinum 2020** 7
   3.1 Eftirlit 8
   3.2 Vegleiðingar o.a. 8
   3.3 Hagtøl 8
   3.4 Munnligir fyrispurningar 11
   3.5 Loyvir og fráboðanir 11
      3.5.1 Loyvir til verkætlanir 12
      3.5.2. Verkætlanir, sum ikki kravdu loyvi frá Dátueftirlitinum 17
      3.5.3 Ílegusavnið (Fráboðaðar granskingarverkætlanir) 17
   3.6 Viðgerðarloyvi eftir 1. januar 2021 17
   3.7 Hoyringar 18
      3.7.1 Lógaruppskot 18
      3.7.2 Kunngerðir 18

4. **Útvald mál í 2020** 19
   4.1 Korona 19
      4.1.1 Kanning av ferðafólkum við landamarkið 19
      4.1.2 Granskingarverkætlanir 20
   4.2 Parkeringsskipanin hjá Vága Floghavn 21
   4.3 Beinleiðis atgongd til skipanir 21
   4.4 Løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli 22

4. **Altjóða samstarv** 23
   4.1 Triðjalandsgóðkenning frá ES-nevndini 23

# ://1 FORORÐ

Við hesum letur Dátueftirlitið ársfrágreiðingina fyri 2020 úr hondum.

Ársfrágreiðingin verður skrivað sbrt. § 68, nr. 7 í dátuverndarlógini og er ætlað almenninginum.

Í ársfrágreiðingini er virksemið hjá Dátueftirlitinum í 2020 lýst í hagtølum. Eisini er yvirskipað greitt frá málum, sum serliga hava fylt í arbeiðnum hjá Dátueftirlitinum í undanfarna ári.

Koronafarsóttin setti sín serliga dám á arbeiðið hjá Dátueftirlitinum í 2020. Hetta fyri tað fyrsta tí, at arbeiðið hjá stovninum í ávísan mun var skert, eins og tað var hjá øllum øðrum stovnum og fyritøkum. Fyri tað næsta tí, at tiltøk, sum vórðu sett í verk av myndugleikum fyri at forða fyri smittuspjaðing í ávísan mun høvdu við viðgerð av persónupplýsingum at gera. Fyri tað triðja tí, at farsóttin og avleiðingarnar av henni vóru týdningarmikil granskingarevni, sum í fleiri førum tóku útgangsstøði í upplýsingum um tann einstaka.

Øll fara óiva at minnast 2020, sum árið, tá koronafarsóttin herjaði. Men týdningarmikið er eisini at minnast, at árið hevði stóran týdning fyri Føroyar í dátuverndarhøpi. 7. juni 2020 var løgtingslóg nr. 80 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin) samtykt í Løgtinginum. Dátuverndarlógin kom ikki í gildi fyrrenn 1. januar 2021, men samtyktin í Løgtinginum í juni hevði við sær, at Dátueftirlitið seinna hálvár í 2020 brúkti nógva orku til at fyrireika gildiskomuna. Hetta m.a. við at gera skrivligar vegleiðingar og hava kunnandi fundir og framløgur.

Sambært dátuverndarlógini bleiv limatalið í Dáturáðnum økt frá trimum limum til fimm limir. Nýggja Dáturáðið tók við 1. juli 2020 og hevði tí við ársenda 2020 virkað í eitt hálvt ár.

Dátuverndarlógin setur nýggj krøv til Dátueftirlitið, sum er stovnurin, sum skal ganga fremst innan dátuverju, og sum skal tryggja, at stovnar, fyritøkur o.o. geva verju av persónupplýsingum nóg stóran gætur. Teimum nýggju krøvunum er Dátueftirlitið við at finna seg til rættis í, og hetta arbeiðið fer at halda fram í komandi tíðum.

Dátueftirlitið hevur týðiliga merkt, at nýggja løgtingslógin hevur havt við sær ein øktan áhuga millum fyritøkur, stovnar og borgarar fyri dátuverndarøkinum. Tað hevur havt við sær, at tað er hent ótrúliga nógv á økinum seinastu mánarnar. Fyritøkur og stovnar hava av álvara sett dátuvernd á breddan, og tað hevur uttan iva havt eina positiva ávirkan á dátuverndina í Føroyum.

Tann eldhugin, sum flest øll, sum Dátueftirlitið hevur samskift við um nýggju løgtingslógina, hava víst, hevur við sær, at Dátueftirlitið fer undir eitt nýtt kapitul í dátuverndarsøgu í Føroyum við nýggjari orku og bjartskygni um møguleikarnar at hækka dátuverndina í Føroyum enn meira.

Tórshavn, 17. mai 2021

Helga á Borg
*Formaður í Dáturáðnum*

Katrin Thorsvig Hansen
*Stjóri í Dátueftirlitinum*

# ://2 DÁTUEFTIRLITIÐ

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarligur myndugleiki, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina. Dátueftirlitið er stovnur undir Løgmansskrivstovuni, men er í virksemi sínum óheft.

Dátueftirlitið umsitur løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin). Dátueftirlitið skal í sínum arbeiði hava eftirlit við allari viðgerð av persónupplýsingum, sum dátuverndarlógin fevnir um.

Dátueftirlitið er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum.

Dátueftirlitið hevur virkað síðan 1. januar 2002, tá persónsupplýsingarlógin, sbrt. løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, kom í gildi. Tað var eisini henda løgtingslógin, sum var galdandi á økinum í 2020, og sum Dátueftirlitið virkaði eftir.

Dátueftirlitið er skipað við Dáturáði, sum verður valt av løgmanni, og avgreiðsluskrivstovu, sum er undir leiðslu av einum stjóra. Limirnir í Dáturáðnum eru persónliga valdir, og formaðurin skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir fyri fýra ár í senn, og somuleiðis verða varalimir valdir fyri fýra ár.

Nýtt Dáturáð varð tilnevnt 1. juli 2020 í sambandi við, at dátuverndarlógin bleiv samtykt. Við nýggju løgtingslógini er ráðið víðkað við tveimum limum og telur nú fimm limir.

**Limirnir í Dáturáðnum 2016-2020:**
Eyðbjørn Larsen, advokatur, formaður
*Varalimur: Rannvá Sólheim, løgfrøðingur*
Óli Simonsen, KT-leiðari.
*Varalimur: Ólavur Ellefsen, stjóri*
Maria Dam, deildarleiðari
*Varalimur: Rudi Kollslíð, lækni*

**Limirnir í Dáturáðnum frá 1. juli 2020:**
Helga á Borg, advokatur, formaður
*Varalimur: Janus Hentze í Stórustovu, løgfrøðingur*
Maria Skaalum Petersen
*Varalimur: Marin Strøm*
Brian Bischoff
*Varalimur: Nicolai Mohr Balle*
Jóhan Lamhauge, tilnevndur eftir tilmæli frá Kommunufelagnum
*Varalimur: Beinta P. Olsen*
Birita Biskopstø, tilnevnd eftir tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
*Varalimur: Marius Thomassen*

**Skrivstovan:**
Á skrivstovuni starvaðust við ársbyrjan í 2020 4 fólk, ein stjóri, 2 fulltrúar og ein skrivari. 15. juni 2020 var ein fulltrúi afturat settur.

Dátueftirlitið heldur til í egnum skrivstovuhølum. Bústaðurin er Reyngøta 33, Tinganes.



## 2.1. JÁTTANIN Á LØGTINGSFÍGGJARLÓGINI

Játtanin hjá Dátueftirlitinum á løgtingsfíggjarlógini í 2020 var kr. 3.252.000,-

Niðanfyri er ein útgreining av fíggjarjáttanini hjá Dátueftirlitinum fyri árini 2018-2020.

| Fíggjarjáttanin hjá Dátueftirlitinum fyri 2018 - 2020 *Sundurgreinað ætlan* | | | |
|---|---|---|---|
| Tús. kr. | **2018 J** | **2019 J** | **2020 J** |
| **Nettoútreiðslujáttan** | **2.045** | **2.445** | **3.252** |
| Lønir o.a. | 1.685 | 2.085 | 2.742 |
| Keyp av vørum og tænastum | 280 | 280 | 430 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 80 | 80 | 80 |

## 2.2. LÓGARGRUNDARLAGIÐ HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

**Í 2020 vóru hesar reglur galdandi:**

- Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004, (persónsupplýsingarlógin).
- Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum (trygdarkunngerðin).
- Kunngerð nr. 31 frá 21. mars 2019 um flutning av persónupplýsingum til útlond.
- Kunngerð nr. 124 frá 19. september 2011 um fráboðanarskyldu og undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi.
- Reglugerð fyri Dáturáðið, dagfest 14. juni 2007. Nýggj starvsskipan fyri Dáturáðið kom í gildi 1. juli 2020.
- Innanhýsis roknskaparreglugerð, seinast góðkend av Løgmansskrivstovuni hin 26. juni 2020.

### 2.2.1 NÝGGJ DÁTUVERNDARLÓG

Í juni 2020 bleiv nýggj løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin) samtykt í Løgtinginum. Dátuverndarlógin kom í gildi 1. januar 2021. Samstundis fór persónsupplýsingarlógin og kunngerðir við heimild í lógini úr gildi.

## 2.3. UPPGÁVURNAR HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

Sambært § 37 í persónsupplýsingarlógini skuldi Dátueftirlitið:

- Av sínum eintingum, ella eftir klagu frá skrásetta, ansa eftir, at viðgerð av persónupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini,
- viðgera fráboðanir og umsóknir um loyvi og áleggja treytir sambært lógarheimild,
- hava ein skipaðan almennan lista yvir allar fráboðanir og loyvir sambært lógini,
- geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum,
- gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar,
- vegleiða privatum og tí almenna í ivamálum og virka fyri, at upplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði,
- fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónsupplýsingum her á landi og uttanlands, og
- gera ársfrágreiðing.

## DÁTUEFTIRLITIÐ

Dátueftirlitið er ein eftirlitsmyndugleiki, sum fyri 1. januar 2021 skuldi tryggja, at persónsupplýsingarlógin varð hildin. Dátueftirlitið skal frá 1. januar 2021 tryggja, at dátuverndarlógin verður hildin. Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum sambært nýggju løgtingslógini eru lýstar í § 66 í dátuverndarlógini.

Dátueftirlitið hevur heimild til at geva kravboð ella steðga viðgerð av persónupplýsingum. Dátueftirlitið hevur eisini heimild at gera kanningar á staðnum, og hava ráðslimir og leiðandi starvsfólk til eina og hvørja tíð uttan dómsúrskurð atgongd til øll høli, haðani persónupplýsingar verða viðgjørdar ella goymdar.

Brot á persónsupplýsingarlógina kunnu verða revsað sbr. §§ 44 og 45.



Dátuverndarlógin setur nýggj krøv til Dátueftirlitið, sum er stovnurin, sum skal ganga fremst innan dátuverju, og sum skal tryggja, at stovnar, fyritøkur o.o. geva verju av persónupplýsingum nóg stóran gætur.

# ://3 VIRKSEMI Í 2020

Dátueftirlitið hevur í 2020 m.a. viðgjørt hesi sløg av málum:

- viðgjørt umsóknir um loyvir og fráboðanir
- vegleitt og ráðgivið almennum myndugleikum, fyritøkum og privatpersónum
- viðgjørt kærur um viðgerð av persónupplýsingum
- framt skriviborðseftirlit
- svarað munnligum og skrivligum fyrispurningum
- ummælt uppskot til nýggja lóggávu
- tikið mál upp av egnum ávum

Dátueftirlitið virkar á einum øki, har tøkniliga menningin er ein týðandi táttur, og stinga nýggir trupulleikar og øki seg javnan upp. Tískil er neyðugt at menna nýggjar mannagongdir á økinum, og í hesum sambandi er neyðugt at fylgja væl við gongdini í grannalondunum.

Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar, og málsviðgerðin er fjøltáttað. Harumframt er økið í vøkstri og støðugari menning og broyting, og tí er stórur tørvur á, at Dátueftirlitið við upplýsing og vegleiðing virkar fyri, at persónupplýsingar verða viðgjørdar í samsvari við reglurnar á økinum.

Fyrispurningar kunnu vera á nógvum ymiskum økjum, men til tíðir eru afturvendandi fyrispurningar. Afturvendandi fyrispurningar hava í 2020 serliga verið um hesi evni:

- Fyrispurningar um dátuverndarlógina
- KT-trygd, heruppií serliga krøv við atliti at trygdarkunngerðini
- Facebook og aðrir sosialir miðlar
- Samankoyring av ymiskum skipanum
- Loyvi til verkætlanir og ymiskar nøgdsemis- og heilsukanningar
- Vakmyndatól

## 3.1. EFTIRLIT

Í 2020 hevur Dátueftirlitið skrásett 13 skriviborðseftirlit.

Í málsviðgerðini hevur Dátueftirlitið serliga lagt dent á at kanna, hvørt KT-trygd og mannagongdir í samband við viðgerð av persónupplýsingum er í samsvari við persónsupplýsingarlógina og trygdarkunngerðina.

Árið 2020 var serstakt við tað, at nýggj dátuverndarlóg var samtykt, tá árið var hálvrunnið. Hetta hevði við sær, at Dátueftirlitið gjørdi av, at nøkur eftirlitsmál vóru lokað vísandi til, at nýggj løgtingslóg skjótt fór at koma í gildi, og at orka heldur átti at verið løgd í at tryggja, at krøvini í nýggju løgtingslógini vóru lokin.

## 3.2. VEGLEIÐINGAR O.A.

Í viðmerkingunum til dátuverndarlógina er greitt frá, at Dátueftirlitið skal leggja størri dent á vegleiðandi arbeiðið og almennu og ítøkiligu kunningina um dátuverndarøkið. Hetta bleiv eisini tikið fram undir viðgerðini í Løgtinginum, sum sera týdningarmikið fyri at stuðla undir broytingina í rættarstøðuni.

Av hesi orsøk fór Dátueftirlitið, so skjótt, sum dátuverndarlógin var samtykt, undir at framleiða skrivligt vegleiðandi tilfar um dátuverndarlógina. Seinnu hálvu av 2020 framleiddi Dátueftirlitið sostatt 16 vegleiðingar um ymisk evni ella ásetingar í dátuverndarlógini, seks skabelónir og eina standard dátuviðgeraravtalu. Vegleiðingarnar o.a. eru tøkar á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, www.dat.fo.

Umframt skrivliga tilfarið, sum Dátueftirlitið framleiddi, legði eftirlitið eisini stóran dent á at halda og luttaka í kunnandi tiltøkum. Dátueftirlitið helt sostatt meir enn 10 kunnandi tiltøk/skeið seinnu hálvu í 2020. Áhugin var stórur millum bæði fyritøkur og stovnar.

Sum nakað nýtt í kunnandi arbeiðinum royndi Dátueftirlitið seg eisini við einum poddvarpi. Í desember vórðu sostatt fýra partar av poddvarpi um ymisk evni lagdir á heimasíðuna hjá Dátueftirlitinum.

## 3.3. HAGTØL

Upplýsingarnar í hesum partinum av ársfrágreiðingini eru grundaðar á skrásetingina av nýggjum málum í journalskipanini hjá Dátueftirlitinum fyri 2020, og fevna sostatt bara um nýggj mál. Ein stórur partur av málunum hjá Dátueftirlitinum er ofta framhald av gomlum málum, t.d. broytingar í givnum loyvum ella fráboðanum. Hesi mál eru ikki tikin við í hetta yvirlitið, sum bara snýr seg um mál, sum eru stovnað í 2020.



## MYND 1. Bólking av málum 2015 - 2020

Mynd 1 niðanfyri vísir talið av málum og munnligum fyrispurningum frá 2015 til og við 2020. Talið á stovnaðum málum í 2020 var 372, og talið á munnligum fyrispurningum var 232.




## MYND 2. Bólking av nýstovnaðum málum í 2020 í tølum



VIRKSEMI Í ÁRINUM 2020

## MYND 3. Málsbýti í mun til myndugleikar, fyritøkur o.t. 2019/2020

Á mynd 3 sæst, at tað serliga vóru almennir myndugleikar og privatar fyritøkur, sum vendu sær til Dátueftirlitið. Hetta var serliga við spurningum um dátuverndarlógina, sum kom í gildi 1. januar 2021.



## 3.4. MUNNLIGIR FYRISPURNINGAR

Í hesum bólki eru bara skrásettir fyrispurningar, har borgarar ella myndugleikar fáa beinleiðis vegleiðing umvegis telefon, og tað ikki snýr seg um samskifti í sambandi við verandi ella komandi mál.

Í 2020 vórðu 232 munnligir fyrispurningar skrásettir. Á myndini niðanfyri sæst, hvussu teir munnligu fyrispurningarnir, sum vóru avgreiddir í 2020, kunnu bólkast.

### MYND 5. Munnligir fyrispurningar

Málsbýti í mun til myndugleikar, fyritøkur, privatpersónar og kommunur.




Málsbýti í mun til myndugleikar, fyritøkur, privatpersónar, kommunur og fjølmiðlar:

| | |
|---|---|
| Almennir myndugleikar, stovnar o.t. | 42 |
| Privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.t. | 70 |
| Privatpersónar | 84 |
| Kommunur | 20 |
| Advokatar | 9 |
| Fjølmiðlar | 7 |
| **Tilsamans** | **232** |

## 3.5. LOYVIR OG FRÁBOÐANIR

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Dátueftirlitinum sambært § 37 í persónsupplýsingarlógini er at viðgera umsóknir um loyvir og fráboðanir.

***Viðgerðarloyvi***

Eitt viðgerðarloyvi er eitt loyvi frá Dátueftirlitinum um, at viðkomandi stovnur, felag, persónur ella annar hevur loyvið at viðgera ávísar viðkvæmar persónsupplýsingar til eitt ávíst endamál og undir ávísum treytum. Viðgerðarloyvir eru oftast tíðaravmarkað.

Viðkvæmar persónupplýsingar eru upplýsingar um lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimsspekiliga ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagsligt tilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti. Í kunngerð nr. 124 frá 19. september 2011 um fráboðanarskyldu og undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi, eru ásett ymisk undantøk til reglurnar um viðgerðarloyvi.

***Fráboðan***

Tá viðgerðarloyvi ikki krevst til eina viðgerð, skal henda tó sum meginregla fráboðast Dátueftirlitinum. Hetta merkir, at Dátueftirlitið skal hava eina frágreiðing um, at viðkomandi ætlar at viðgera ávísar persónsupplýsingar. Fráboðanin skal latast Dátueftirlitinum í seinasta lagi 30 dagar,

áðrenn viðgerðin er ætlað at byrja. Sí eisini kunngerð nr. 124 frá 19. september 2011 um fráboðanarskyldu og undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi.

### 3.5.1. Loyvi til verkætlanir

Dátueftirlitið hevur í 2020 givið loyvi til ymiskar verkætlanir. Av hesum verkætlanum kunnu m.a. nevnast hesar:

Verkætlan:

Sosialpolitik på Færøerne – en analyse af arbejdsmarkedstilknytning for marginaliserede grupper i det færøske samfund, med særlig fokus på effekten af indsatsen vedrørende arbejdsfremmende tiltag.

**Dátuábyrgdari:**
Roskilde Universitet,
Michael H. Feldballe Hansen

**Endamál:** At kanna ”motivation, egen-forventning og regelforståelse blandt borgere der modtager sagsbehandling i forbindelse med” virknisvenjing og arbeiðsfremjandi tiltøk í Almannaverkinum.

**Háttur:** Spurnarbløð.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 19. mai 2020 til 31. mars 2021.

Verkætlan:

”Vulnerability during Infancy to Immunotoxic Exposures - Viðkvæmi í barnaárum fyri immuntálmandi dálkingarevnum”.

**Dátuábyrgdari:**
Deildin fyri Arbeiðs- og almannaheilsu,
Pál Weihe/Maria Skaalum Petersen.

**Endamál:** At gera eina burðarkohortu, har fylgt verður við móður og barni frá tíðliga í graviditetinum til tess at kanna hvussu útsetilsi fyri dálkingarevnum í móðurlívi ávirkar menningina av immunverjuni hjá barninum.

**Háttur:** Hagtalslig viðgerð.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 1. apríl 2020 og heldur fram til og við 1. apríl 2030.

Verkætlan:

Kanning av hvussu tað upplivist at vera avarðandi hjá svárt sálarsjúkum í Føroyum. At kannað møguligar fyrimunir og vansar við at búgva í eini smátjóð, og harvið skula fyrihalda seg til multiplexar relatiónir.

**Dátuábyrgdari:**
Inga Magnussen.

**Endamál:** At kanna hvussu avvarðandi uppliva at vera avvarðandi hjá sálarsjúkum í Føroyum.

**Háttur:** Samrøður.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 30. mars 2020 til 31. januar 2021.

Verkætlan:
"Dagbók í eini koronatíð".

**Dátuábyrgdari:**
Fróðskaparsetur Føroya, Erika Anne Hayfield.

**Endamál:** At skjalfesta og kanna, hvussu fólk uppliva hóttanina av korona, og tær ógvusligu samfelagstillagingarnar, sum hava verið gjørdar. Við at fáa innlit í tankar, kenslur, upplivingar og eygleiðingar, sum fólk gera sær, kunnu vit fremja vitan um, hvussu fólk navigera eina so ógvusliga sosiala broyting.

**Háttur:** Upplýsingarnir verða savnaðir umvegis fólk, sum sjálvboðin hava boðið sær at skriva dagbók eftir almennari áheitan.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 2. apríl 2020 til 31. desember 2021.

Verkætlan:
Science as a Political Battlefield: How Cultural Values Shape People´s Attitudes to Science.

**Dátuábyrgdari:**
Fróðskaparsetur Føroya, Heini í Skorini.

**Endamál:** At kanna fólksligan hugburð til vísindi og vísindaligar spurningar í Føroyum. At kanna, hvørjir faktorar mynda fólksligan hugburð til vísindi og vísindaligar spurningar.

**Háttur:** Meiningarkanning verður gjørd av Lóður við talgildum spurnarblað.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 21. apríl 2020 til 1. juni 2020.

Verkætlan:
"Hvussu nógv fólk í Føroyum hava andevni í blóðinum móti koronavirus".

**Dátuábyrgdari:**
Deildin fyri Arbeiðs- og almannaheilsu,
Pál Weihe og Maria Skaalum Petersen.

**Endamál:** At kanna veruligu útbreiðsluna av koronuvirus í Føroyum við at kanna 1000 tilvildarligar føroyingar fyri andevni móti Covid-19 virus.

**Háttur:** Spurnarbløð og blóðroyndir.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 17. apríl 2020 til 31. desember 2021.

Verkætlan:

"Sjúkueyðkenni hjá fólki, sum eru smittað við COVID19".

**Dátuábyrgdari:**
Deildin fyri Arbeiðs- og almannaheilsu,
Pál Weihe og Maria Skaalum Petersen.

**Endamál:** At kanna sjúkutekin/eyðkenni hjá fólki, sum hava haft korona smittuna og sum hava fingið at vita, at tey eru vorðin frísk.

**Háttur:** Samrøður við sjúklingar og hartil blóðroyndir.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 17. apríl 2020 og til 31. desember 2021.

Verkætlan:

"Heilsustøðan hjá teimum eldru 75+ í Føroyum".

**Dátuábyrgdari:**
Landsfelag Pensjónista, L. Hentze,
Gallup og Maria S. Petersen.

**Endamál:** At fáa at vitan og neyvari ábendingar, um tað eru umstøður hjá teimum eldru, sum Landsfelag Pensjónista eigur at arbeiða fyri at betra, t.d. fáa fleiri tilboð til at betra heilsustøðuna, hóskandi bústaðarúrval og flutningstænastu.

**Háttur:** Gallup savnar upplýsingarnar inn umvegis spurnarbløð.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 7. oktober 2020 til 31. desember 2020.

Verkætlan:

"Ha? Hoyribrekøkið 2020" hjá felagnum Hoyr.

**Dátuábyrgdari:**
Majbritt Jacobsen.

**Endamál:** At fáa kunnleika um, hvussu nógv í Føroyum hava niðursetta hoyrn, nýta hoyritól og hvussu lívsumstøðurnar hjá hesum fólkum eru.

**Háttur:** Samrøður.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvi er galdandi frá 1. august 2020 til 31. desember 2020.

Verkætlan:

"Menn um heilsu".

**Dátuábyrgdari:**
Deildin fyri Heilsu- og sjúkrarøktarvísindi, Fróðskaparsetur Føroya, Magni Mohr.

**Endamál:** At fáa størri innlit í heilsuuppfatanina hjá monnum. Við serligum atliti til at kunna skapa eina heilsufremjandi skipan, sum hóskar monnum, ið tykjast at vera í (heilsu) vandabólki.

**Háttur:** Samrøður.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvi er galdandi frá 18. juni 2020 til 1. juli 2021.

Verkætlan:

"Hvussu nógvir føroyingar í aldrinum 15-20 hava Trachlea Dysplasi (TD), um hetta er arvaligt, og ílegukanningar".

**Dátuábyrgdari:**
Landssjúkrahúsið, Steinar Eirikstoft.

**Endamál:** At kanna, hvussu nógvir føroyingar í aldrinum 15-20 ár hava Trochlea Dysplasi TD, um hetta er arvaligt og hvør váðaatferð er, sum ger, at ein keikir knæskelina. Harafturat at skráseta øll við TD í ein dátugrunn, sum næstu 30 árini kunnu fylgjast við talgildum spurnarbløðum árliga.

**Háttur:** MR-skanning av báðum knøunum, eina blóðroynd til genetiskar kanningar og spurnarblað.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 25. september 2020 til 1. juni 2022.

Verkætlan:

"Glukosu metabolisma og immunverja hjá vaksnum fólki, sum hava verið fyri dálkingarevnum í móðurlívi".

**Dátuábyrgdari:**
Deildin fyri Arbeiðs- og almannaheilsu, Pál Weihe.

**Endamál:** At kanna nærri stoffskifti hjá luttakarunum í kohortu 1 við eini tøkni, tey á enskum kalla "untargeted high-resolution metabolomics" (HRM).

**Háttur:** Blóðroynd.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvi til verkætlanina sum byrjaði í 2012 longt til 1. mai 2022.

Verkætlan:
"Hjálpartólaveiting út frá áskoðanini hjá teimum, sum hava hjálpartól".

**Dátuábyrgdari:**
Turið Jacobsen, aut. ergoterapeutur.

**Endamál:** At kanna, hvussu fólk, sum hava fingið hjálpartól, uppliva veitingargongdina at fáa hjálpartól. Harumframt at kanna, hvussu gongdin ítøkiliga var, um hjálpartólini verða brúkt, til hvat tey verða brúkt og um tey ikki verða brúkt – hví tað er.

**Háttur:** Spurnarbløð.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 1. oktober 2020 til 31. apríl 2021.

Verkætlan:
"Hvørjar avbjóðingar uppliva harðskapsraktar kvinnur í Føroyum, í mun til at etablera sær eitt lív uttan harðskap".

**Dátuábyrgdari:**
Fróðskaparsetur Føroya, Eyðvør Tausen Olsen.

**Endamál:** At finna útav, hvørjar avbjóðingar kvinnur hava, tá tað kemur til at skapa sær eina tilveru uttan harðskap, og at finna útav hvønn tørv kvinnurnar meta seg hava, eftir uppihald á Kreppumiðstøð, fyri at tað skal eydnast teimum at koma burtur úr harðskapinum.

**Háttur:** Samrøður.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 2. oktober til 30. juni 2021.

Verkætlan:
"Krabbatíttleiki hjá kvinnum í Føroyum, sum hava verið fyri hormonávirkandi evnum".

**Dátuábyrgdari:**
Deildin fyri Arbeiðs- og almannaheilsu,
Pál Weihe.

**Endamál:** At eftirkanna eina hypotesu um, at útsetilsi fyri hormonórógvandi evni kann leiða til krabbamein hjá kvinnum.

**Háttur:** At nýta kohortukanningar á Deildini fyri Arbeiðs- og almannaheilsu og samanbera tær við Krabbameinsskránna.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 16. oktober 2020 til 31. desember 2020.

Verkætlan:
"Ung, kostur og rørsla".

**Dátuábyrgdari:**
Deildin fyri Arbeiðs- og almannaheilsu, Marin Strøm.

**Endamál:** At fáa holla vitan um støðuna viðvíkjandi kosti og rørslu hjá teimum ungu í Føroyum.

**Háttur:** Spurnarblað umframt at nýta kost-kohortuna hjá DFAA.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið givið 11. desember 2020.

### 3.5.2. VERKÆTLANIR, SUM IKKI KRAVDU LOYVI FRÁ DÁTUEFTIRLITINUM

Dátueftirlitið hevur í 2020 viðgjørt aðrar verkætlanir, har niðurstøðan hjá Dátueftirlitinum hevur verið, at loyvi frá Dátueftirlitinum ikki krevst til viðkomandi verkætlanir. Talan hevur verið um verkætlanir, har persónar ikki kunnu eyðmerkjast og um verkætlanir, har viðkvæmar persónsupplýsingar ikki hava verið viðgjørdar.

### 3.5.3. ÍLEGUSAVNIÐ (FRÁBOÐAÐAR GRANSKINGARVERKÆTLANIR)

Ílegusavnið varð sett á stovn við løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum (Ílegulógin), og í §§ 3-5 og 7 hevur Ílegusavnið lógarheimild at viðgera viðkvæmar persónupplýsingar.

Í 2020 hevur Ílegusavnið fráboðað hesar verkætlanir:

- Forkanningarverkætlan – COVID-19 yvirlit – tilburðir av COVID-19 í Føroyum, epidemiologisk databasu verkætlan.
- Leinging av verkætlanini "Defining the genetic etiology of dementia/Alzheimer´s disease in the Faroe Islands"
- Ílegulesing av føroyingum, sum hava verið smittaðir við SARS-CoV-2. At kanna um ávísar ílegur hava samband við ymisk sjúkueyðkenni, og um ávísar ílegur kunnu verja ein ella økja um vandan fyri smittu.

### 3.6. VIÐGERÐARLOYVI EFTIR 1. JANUAR 2021

Dátuverndarlógin, sum kom í gildi 1. januar 2021, hevur við sær, at tað ikki longur krevst loyvi frá Dátueftirlitinum at viðgera viðkvæmar persónupplýsingar.

Í § 81, stk. 3 í dátuverndarlógini stendur, at loyvi, sum Dátueftirlitið hevur givið, sbrt. løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, eru galdandi til 1. januar 2022.

Í viðmerkingunum til § 81, stk. 2 (sum bleiv broytt til stk. 3 undir viðgerðini í Løgtinginum) stendur:

*"Í stk. 2 er lagt upp til, at viðgerð, sum í dag fer fram grundað á loyvi frá Dátueftirlitinum, kann fara fram sambært loyvinum til 1. januar 2022. Henda áseting hevur við sær, at dátuábyrgdarar o.o., sum hava innrættað seg grundað á eitt loyvi frá Dátueftirlitinum, hava longri tíð at innrætta seg til nýggju lógina. Hetta er einans galdandi fyri viðgerð, sum longu er í gongd, tá lógin kemur í gildi, og sum Dátueftirlitið hevur heimilað. Tað merkir, at nýggj viðgerð ella nýggjur flutningur kann ikki fara fram grundað á loyvi givin eftir áður galdandi lóg."*

Hetta merkir, at fyri verkætlanir, sum longu eru í gongd og sum hava eitt loyvi, sum ikki hevur stytri gildistíð enn til 1. januar 2022, er skiftistíðin til dátuverndarlógin kemur í gildi eitt ár longri.

## 3.7. HOYRINGAR

Sambært § 37, nr. 4 í persónsupplýsingarlógini skal Dátueftirlitið geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum víðvíkir persónupplýsingum.

Dátueftirlitið fær ofta lógaruppskot, kunngerðaruppskot o.a. til ummælis. Í hvørjum einstøkum føri metir Dátueftirlitið um, hvørt uppskotið er í samsvari við lóggávuna, sum Dátueftirlitið umsitur ella um broytingar eiga at verða gjørdar í uppskotinum.

### 3.7.1. LÓGARUPPSKOT

Dátueftirlitið hevur í árinum fingið hesi lógaruppskot til hoyringar:

- Uppskot til broyting í vápnalógini.
- Uppskot til løgtingslóg um doping og óreiðiliga ávirkan í ítrótti.
- Uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvasking av vinningi og fígging av yvirgangi.
- Uppskot til løgtingslóg um økisnøvn á netinum.
- Uppskot til løgtingslóg um vakmyndatól í undirsjóvartunnlunum og um rætt hjá tunnilsfeløgunum at fáa elektroniskar upplýsingar úr akfarsskránni hjá Akstovuni.
- Uppskot til løgtingslóg um yvirvaking við vakmyndatóli.
- Uppskot til broytingar í autorisatiónslógini.
- Uppskot til broytingar í sundhedsloven.
- Uppskot til broytingar í komitélógini.
- Uppskot til broyting í løgtingslóg um ferðslu.
- Uppskot til broytingar í løgtingslóg um toll.

### 3.7.2. KUNNGERÐIR

Dátueftirlitið hevur í árinum fingið hesar kunngerðir til ummælis:

- Uppskot til kunngerð um flyting uttan samtykki.
- Uppskot til kunngerð um ávaringarskipan og peilingarskipan o.a.
- Uppskot til kunngerð um námsfrøðiligt eftirlit.
- Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um vápn v.m.
- Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um skráseting av vápnum.
- Uppskot til kunngerð um veiðidagbók fyri føroysk fiskifør.
- Uppskot til kunngerðir sambært politilógini.
- Uppskot til kunngerðir sambært PET-lógini.
- Uppskot til broyting í kunngerð um serlig bútilboð.
- Uppskot til kunngerð um óljóð frá skipum við bryggju.
- Bekendtgørelse for Færøerne om behandling av personoplysninger i Det centrale kriminalregister

# ://4 ÚTVALD MÁL Í 2020

Av tí, at nýggj løgtingslóg kom í gildi 1. januar 2021, er serliga umráðandi at geva sær fær um, at ársfrágreiðingin tekur støði í eini rættarstøðu, sum í skrivandi stund er ein onnur enn hon var í 2020. Av hesi orsøk eru fleiri mál, sum tað ikki er viðkomandi at taka fram. Tað eru tó nøkur mál, sum hóast hetta skulu takast fram.

## 4.1. KORONA

Koronufarsóttin fylti nógv í 2020 og soleiðis var eisini hjá Dátueftirlitinum. Hetta m.a. tí, at tiltøk, sum vórðu sett í verk av myndugleikum fyri at forða fyri smittuspjaðing í ávísan mun høvdu við viðgerð av persónupplýsingum at gera, og tí, at farsóttin og avleiðingarnar av henni vóru týdningarmikil granskingarevni, sum í fleiri førum tóku útgangsstøði í upplýsingum um tann einstaka.

Sum greitt frá omanfyri undir pkt. 3.5. ásetti persónsupplýsingarlógin, at Dátueftirlitið í útgangsstøðinum skuldi geva loyvi til viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum. Í ávísum førum var fráboðan til Dátueftirlitið nóg mikið.

Av tí, at koronufarsóttin hevði við sær, at upplýsingar um heilsustøðu skuldu viðgerast í ymsum samanhangum, kravdist í fleiri førum loyvi frá Dátueftirlitinum frammanundan.

### 4.1.1. KANNING AV FERÐAFÓLKUM VIÐ LANDAMARKIÐ

Í juni 2020 var politisk avgerð tikin um, at øll ferðafólk eldri enn 11 ár, skuldu kannast fyri COVID-19 við komu til Føroyar.

Av tí, at talan var um at viðgera upplýsingar um heilsustøðu hjá ferðafólkum, kravdi ein slík skipan loyvi frá Dátueftirlitinum. Dátueftirlitið fekk umsókn um loyvi at kanna ferðafólk, sum komu flogvegis til Føroya, frá Deildini fyri Arbeiðs- og almannaheilsu.

Deildin fyri Arbeiðs- og almannaheilsu var at meta sum dátuábyrgdari. Upplýst var, at Thetis m.a. skuldi taka sær av at pota og gera analysur av royndunum. Thetis var tí ein dátuviðgeri hjá Deildini fyri Arbeiðs- og almannaheilsu.

Um skipanina var greitt frá, at um øll ferðafólkini við einum flogfari verða testað negativ fyri koronu, gevur Thetis Deildini fyri Arbeiðs- og almannaheilsu boð. Deildin fyri Arbeiðs- og almannaheilsu gevur síðani flutningsfelagnum boðini. Flutningsfelagið gevur ferðafólkunum boð. Um eitt ella fleiri ferðafólk verða testað positiv fyri koronu, letur Thetis allar kanningar til Deildina fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu. Avrit av persónupplýsingum ella kanningum verða ikki goymdar hjá Thetis. Deildin fyri Arbeiðs- og almannaheilsu letur beinanvegin upplýsingarnar telefoniskt og skrivliga til landslæknan.

Dátueftirlitið metti, at viðgerðin av viðkvomu persónupplýsingunum, sum umsóknin snúði seg um, var neyðug fyri at útinna almennan myndugleika, sum er álagdur dátuábyrgdara, sbrt. persónsupplýsingarlógini, § 10, stk. 1, nr. 6, sbrt. § 16, stk. 1 í farsóttarlógini, sbrt. anordning nr. 655 af 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme, sum seinast broytt

við bekendtgørelse nr. 180 frá 5. mars 2020.

Dátueftirlitið legði eisini dent á, at eftirlitið hevði móttikið skjalprógv fyri, at handfaringin av viðkvomu persónupplýsingunum var í samsvari við persónsupplýsingalógina og tær reglur, sum settar vóru í gildi við heimild í lógini. Deildin fyri Arbeiðs- og almannaheilsu hevði m.a. skjalfest, at viðgerðin leyk treytirnar um trúnað, sjálvræðisrætt og innlit. Eisini hevði Deildin fyri Arbeiðs- og almannaheilsu sett nøktandi teknisk og fyriskipanarlig trygdartiltøk í verk.

Í málinum hevði Dátueftirlitið eisini móttikið skjalprógv fyri, at Thetis einans viðgjørdi viðkvomu persónupplýsingarnar eftir fyriskipan frá Deildini fyri Arbeiðs- og almannaheilsu, og at Thetis hevði bundið seg til at tryggja, at viðgerðin leyk treytirnar í persónsupplýsingarlógini.

Dátueftirlitið gav 27. juni 2020 viðgerðarloyvi við gildi til 11. juli 2020. Loyvið bleiv eftir hetta – eftir umsókn – longt fleiri ferðir. Síðstu ferð til 1. januar 2021. Eftir 1. januar 2021 krevst ikki loyvi frá Dátueftirlitinum at viðgera av viðkvæmar persónupplýsingar.

## 4.1.2. GRANSKINGARVERKÆTLANIR

Omanfyri undir pkt. 3.5.1. er víst á nakrar av teimum granskingarverkætlanum har loyvi til viðgerð av viðkvomum persónupplýsingum var neyðugt. Høvuðsfokus hjá Dátueftirlitinum í viðgerðini av slíkum málum er at tryggja, at nøktandi heimild er fyri viðgerðini, og at nøktandi trygdartiltøk eru sett í verk, sum tryggja, at persónupplýsingar verða viðgjørdar á ein tryggan hátt.

Sum sæst hava endamálini við granskingarverkætlanunum m.a. verið at kanna, hvussu koronufarsóttin og tiltøkini, sum hava verið sett í verk, sum heild hava ávirkað fólk í Føroyum, og at kanna hvussu nógv hava verið sjúk, og hvussu sjúk tey hava verið.

Umframt verkætlanirnar, sum hava kravt loyvi frá Dátueftirlitinum, hevur Dátueftirlitið eisini fingið tvær fráboðanir frá Ílegusavninum um verkætlarnir, sum snúgva seg um kanningar í samband við koronu. Eisini fekk Dátueftirlitið fyrispurningar um kanningar, sum so ella so høvdu við koronu og avleiðingar av farsóttini at gera, men sum eftir ítøkiliga meting ikki kravdu loyvi frá Dátueftirlitinum, av tí at verkætlanin ikki fevndi um viðkvæmar persónupplýsingar.

Í eini serligari tíð er tað týdningarmikið, at granskingarverkætlanir, sum eru við til at savna vitan, sum eru føroyska samfelagnum til fyrimuns, verða settar í verk, samstundis sum upplýsingar um tann einstaka verða nøktandi vardar.





## 4.2. PARKERINGSSKIPANIN HJÁ VÁGA FLOGHAVN

21. juli 2020 setti Vága Floghavn seg í samband við Dátueftirlitið um nýtsluna av gjaldsskipanini á flogvøllinum. Vága Floghavn greiddi m.a. frá, at bæði gjøgnum gjaldsautomatirnar á flogvøllinum og gjøgnum online gjaldsportalin fekst, við at tasta nummarplátu inn, atgongd til m.a. yvirlitsmynd (mynd av ferðandi í bilinum). Óviðkomandi høvdu sostatt atgongd til persónupplýsingar um vitjandi á Vága Floghavn.

22. juli gav Dátueftirlitið Vága Floghavn boð um at steðga nýtsluni av gjaldsskipanini alt fyri eitt, tí at trygdarfyriskipanir ikki vóru í lagi.

Vága Floghavn steðgaði 24. juli nýtslu av online gjaldsportali og gjaldsautomatum á flogvøllinum. Felagið hevði undan hesum strikað yvirlitsmyndirnar, so at tøku upplýsingarnar eftir tað vóru – umframt nummarpláta, sum kundin sjálvur skal tasta inn – komutíðspunkt og skuld.

Í avgerð 10. oktober 2020 metti Dátueftirlitið, at skipanin hjá Vága Floghavn kundi takast í nýtslu aftur m.a. treytað av, at Vága Floghavn tryggjar, at skipanin ikki vísir yvirlitsmyndir (mynd av ferðandi í bilinum). Nýtsla var eisini treytað av, at kunnað verður á parkeringsautomatunum og í online loysnini um, at óviðkomandi nýtsla ikki er loyvd. Harumframt var krav um at skelta á parkeringsøkinum og kunna á heimasíðuni um parkeringsskipanina og dátuvernd.

## 4.3. BEINLEIÐIS ATGONGD TIL SKIPANIR

Tá ein myndugleiki fær beinleiðis atgongd til eina skipan hjá einum øðrum myndugleika ella fyritøku, kann hetta hava við sær, at myndugleikin fær beinleiðis atgongd til persónupplýsingar. Orsakirnar til, at ein myndugleiki fær atgongd til skipan hjá øðrum kunnu vera fleiri, men aloftast er tað tí, at myndugleikin hevur brúk fyri upplýsingum í sambandi við eftirlitsarbeiði ella myndugleikaútinnan annars.

Tá ein myndugleiki fær beinleiðis atgongd til persónupplýsingar í skipan hjá einum øðrum myndugleika ella fyritøku, verða viðgerðarreglurnar í persónsupplýsingarlógini settar til síðis.

Viðgerðarreglurnar hava við sær, at ein myndugleiki, sum hevur tørv á upplýsingum, biður um hesar, og at myndugleikin ella fyritøkan, sum fær umbønina, tekur støðu til um heimild er at geva persónupplýsingarnar víðari. Sostatt verður tað í hvørjum einstøkum føri ítøkiliga tikin støða til, um treytirnar fyri at geva upplýsingar víðari eru loknar.

Av tí, at viðgerðarreglurnar á henda hátt verða settar til síðis við beinleiðis atgongd og tí at ein almennur myndugleiki skal hava greiða heimild fyri sínum virksemi, sum kann vera inntrívandi fyri tann einstaka, er tað siðvenjan hjá Dátueftirlitinum, at slík beinleiðis atgongd í útgangsstøðinum skal heimilast í lóg. Heimildin í lóg er m.a. við til at tryggja gjøgnumskygni fyri borgaran o.o. Hóast heimildin verður fingin til vega í lóg, skulu m.a. meginreglurnar fyri viðgerð

av persónupplýsingum og ásetingar um trygd í persónsupplýsingarlógini (nú dátuverndarlógini) fylgjast.

Dátueftirlitið fekk í 2020 tvey lógaruppskot til ummælis, sum høvdu við sær, at myndugleikar fingu beinleiðis atgongd til skipanir hjá øðrum myndugleika ella fyritøku.

Hetta var uppskot til broyting í vápnalógini, sum gav landsstýrismanninum heimild at áseta reglur um beinleiðis atgongd til vápnaskránna. Sambært viðmerkingunum til uppskotið skuldi heimildin brúkast til at geva politinum atgongd til vápnaskránna. Dátueftirlitið vísti í ummælisskrivinum á, at beinleiðis atgongd kann hava við sær øktan møguleika fyri trygdarbroti, og Dátueftirlitið mælti tí til, at nøktandi trygdartiltøk vórðu sett í verk. Broytingin var samtykt í Løgtinginum í desember 2020.

Hitt uppskotið var uppskot til broyting í løgtingslóg um toll. Uppskotið gav landsstýrismanninum heimild at áseta, at tollvaldið fær beinleiðis atgongd til skipanir hjá flutningsfeløgum. Dátueftirlitið vísti í ummælisskrivinum m.a. á, at TAKS skal tryggja at tøknilig trygdartiltøk eru uppá pláss, og at atgongdin verður avmarkað til neyðugar upplýsingar. Lógaruppskotið var í broyttum líki lagt fyri Løgtingið í februar 2021.

## 4.4. LØGTINGSLÓG UM YVIRVØKU VIÐ VAKMYNDATÓLI

Dátueftirlitið fekk í august 2020 uppskot til løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli til ummælis. Nýggja løgtingslógin skuldi koma í staðin fyri lov om forbud mod privates TV-overvågning m.v., sum var sett í gildi í Føroyum í 1988.

Viðgerð av persónuupplýsingum við vakmyndatóli og fráboðan um vakmyndatól hevur verið ein stórur partur av arbeiðnum hjá Dátueftirlitinum, og tí hevði uppskotið serligan áhuga fyri eftirlitið. Sambært uppskotinum skuldi tað framhaldandi vera bannað hjá privatum at yvirvaka almenn øki o.s.fr., men í samsvar við tær broytingar, sum dátuverndarlógin hevði við sær, var lagt upp til, at fráboðanarskyldan, sum hevur verið galdandi, og sum at kalla hevur verið ein loyvisskipan, bleiv tikin av.

Dátueftirlitið vísti í ummælisskrivinum á ymsar broytingar, sum eftirlitið metti skuldi takast við í uppskotið. Hetta var serliga fyri, at nýggja fráboðanarskyldan, sum var ásett í uppskotinum, skuldi gerast greiðari.

Nýggja løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli varð samtykt í Løgtinginum í desember 2020 og kom í gildi 1. januar 2021.

# ://5 ALTJÓÐA SAMSTARV

Eitt, sum eyðkennir londini rundanum okkum, tá talan er um vernd av persónupplýsingum, er eitt víttfevnandi altjóða samstarv. Hetta samstarv hevur stóran týdning, og er neyðugt orsakað av, at persónupplýsingar ofta verða fluttar um landamørk. Tá tað er møguligt, luttekur Dátueftirlitið í hesum samstarvi.

Koronufarsóttin í 2020 hevur havt við sær, at Dátueftirlitið ikki hevur luttikið á fundum el.tíl. uttanlands.

## 5.1. TRIÐJALANDSGÓÐKENNING FRÁ ES NEVNDINI

Innlendismálaráðið søkti í 2005 ES-nevndina um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland í persónsupplýsingarhøpi. Í 2010 komu boðini um, at ES-nevndin hevur góðkent Føroyar sum eitt trygt triðjaland.

Dátueftirlitið fegnast um ES góðkenningina, sum í høvuðsheitum merkir, at ES metir trygdarstøðið í Føroyum vera á jøvnum føti við trygdarstøðið í ES londum, tá tað snýr seg um viðgerð av persónsupplýsingum.

Triðjalands góðkenningin hevur við sær, at Føroyar komu á listan yvir trygg triðjalond og hevur havt týdning fyri føroyskar fyritøkur, herundir peningastovnar, sum samskifta nógv við útheimin. Avgerðin um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland kom í gildi tann 15. juni 2010.

Í sambandi við, at ES-fyriskipanin General Data Protection Regulation (GDPR) kom í gildi í 2018 hevur ES-nevndin arbeitt við at endurskoða tær góðkenningar, sum eru givnar eftir reglunum, sum áður vóru galdandi. ES-nevndin hyggur í hesum sambandi eisini at føroysku góðkenningini. Arbeiðið við at endurskoða føroysku góðkenningina er ikki liðugt enn.




**Dátueftirlitið**

Vit virka fyri hægri dátuverju

www.dat.fo